## Einki ólógligt

Norska ákæruvaldið ger ikki meiri við óhappið, tá fiskiskipið »Herøya« fór á land og sakk við Hustadvika í januar. Tá løgreglan avhoyrdi manningina, kom hon til ta niðurstøðu, at yvirmenninir á brúnni høvdu gjørt eitt mistak. Kortini var eingin sjófrágreiðing í rættinum, og sambært løgregluni var einki revsivert í málinum, sum tí verður lagt til viks. »Herøya« fór á land 25. januar, og øll manningin varð bjargað av skipinum.



# hevði stórt avlop í fjør



*- Tað hevur stóran týdning fyri virksemið hjá okkum, at vit hava nakað til arbeiðsfólkið alt árið. Høvdu vit bara havt gulllaksavirksemið í summarhálvuni, hevði verið torført at hildið upp á fólkið, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni*

Mynd: Vilmund Jacobsen

at vit arbeiða gulllaks í summarhálvuni og upsa í vetrarhálvuni, sum er hin besta tíðin til upsaframleiðslu. Eg trúgvi, at flestu upsavirki fáa tað at bera til við um veturin. Truplari er um summarið, tá upsin gevur lítið – og framleiðslan hjá fleiri virkjum gevur hall.

Men tað er heldur ikki hvørt ár, at fyrimunirnir við gulllaksinum eru so eyðsýndir.

- Summi ár gevur hann lítið og onnur ár meira. Í fjør var eitt gott ár við stórum eftirspurningi eftir gulllaksafarsi.

Jóan Magnus sigur, at Tavan longu er liðug at selja alla gulllaksaframleiðsluna, sum annars helst skuldi varað, til nýggja vertíðin byrjar.

- Soleiðis eru útlit til, at vit kundu havt selt uppaftur størri nøgdir av gulllaksi í vetur, um vit høvdu meira á goymslu.

Hann heldur, at útlitini við gulllaksinum komandi vertíð eru á leið tey somu sum seinastu vertíð.

- Tað skal ikki so nógv til, at útlit broytast, men fyribils sær út til, at hesi eru positiv, leggur Jóan Magnus aftrat.

### Gulllaksur og upsi

Spurdur, hvussu góða úrslitið seinasta ár býtir seg millum gulllaks og upsa, sigur stjórin í Tavuni, at umleið 70% stava frá gulllaksinum og eini 30% frá upsanum.

- Vit hava eftirhondini eitt gott fiskavirki, og vit halda, at kombinatiónin við gulllaksi í summarhálvuni og upsa í vetrarhálvuni sum heild roynist væl.

Tað er ymiskt, hvussu stórar nøgdir av gulllaksi Tavan keypir í vertíðini. Hetta hevur verið skiftandi, og okkurt árið herfyri var talið heilt niðri á 2.200 tonsum, tá marknaðurin var rættiliga trekur.

Í fjør keypti virkið 6.500 tons av gulllaksi og 2.200 tons av upsa.

Jóan Magnus sigur, at vanliga vertíðin við gulllaksi er frá fyrst í apríl til út í september, og onkuntíð hava tey arbeitt gulllaks heilt út í oktober.

- Men tað er eisini hent, at vit hava arbeitt gulllaks bert nakrar fáar mánaðir um summarið, leggur hann aftrat.

Stjórin í Tavuni sigur, at tað, sum er avgerandi, nær lagt verður um til gulllaks, er, nær skipini, sum annars veiða upsa, fara á gulllaksaveiði.

- Gongur væl við upsanum, nógv er at fáa, og prísirnir eru lutfalsliga góðir, kann tað draga nakað út, áðrenn skipini fara á gulllaks.

Jógvan Magnus sigur seg tó vóna, at Tavan sleppur hampiliga tíðliga í gongd við gulllaksinum í ár, nú marknaðarútlitini enn einaferð tekna seg so rímiliga væl, og prísútlitini til skipini, sum veiða fiskin, eisini skuldu verið at liva við.

### Tvær vaktir

Stjórin í Tavuni heldur, at skal lønandi vinna fáast burtur úr upsanum, er tað ein fyrimunur, um arbeitt verður í tveimum vaktum.

-Veðrið hevur verið óstøðugt í mars, og lutfalsliga lítil fiskur hevur verið á marknaðinum. Hetta hevur elvt til, at heldur minni hevur verið at gjørt á virkinum, og onkrir dagar eru farnir burtur ímillum, har einki arbeiði hevur verið.

Men, sigur Jóan Magnus, at arbeitt verður altíð í tveimum vaktum, tá nóg mikið av fiski fæst til virkingar.

- Vit hava eisini verið rímiliga væl ajour við framleiðslu av bíløgdum upsavørum, og nú minni fiskur hevur verið á marknaðinum, hava vit ikki so altráðir lagt okkum út í kappingina um hendan fiskin.

Tá gulllaksur verður virkaður á Tavuni, verður eisini arbeitt í tvey-skiftivakt, men tá eru hesar vaktirnar 10 tímar hvør, og soleiðis er framleiðslan í gongd heilar 20 tímar av 24 í hvørjum samdøgni.

Eini 60 fólk eru til arbeiðis á Tavuni í vetrarhálvuni og 40 í summarhálvuni, men Jóan Magnus dylur ikki, at tey kundu havt brúkt nøkur fólk aftrat í vetur.

- Onkur, sum arbeiðir á virkinum, hevur verið her heilt síðan P/F Frost rak virksemið í bygninginum, men flestu arbeiðsfólkini eru heilt ung – ella eisini eru tey tilkomin. Vit hava ikki so nógv fólk, sum vit plaga at siga eru í besta arbeiðsføra aldri.

Jóan Magnus leggur tó dent á, at Tavan hevur gott og óføra rakst fólk, sum virkuliga eiga sína stóra lut í allari gongdini.

- Vit hava eisini nakrar skúlanæmingar, sum hjálpa okkum eftir skúlatíð, og hetta kemur væl við, tá ástendur, sigur hann.

Eini 3-4 fólk úr útlandinum arbeiða eisini á Tavuni.

### Stóran týdning

- Tað hevur stóran týdning fyri virksemið hjá okkum, at vit hava nakað til arbeiðsfólkið alt árið. Høvdu vit bara havt gulllaksavirksemið í summarhálvuni, hevði verið torført at hildið upp á fólkið, leggur Jóan Magnus aftrat.

Á Tavuni verður gulllaksurin virkaður til fars, og upsin verður virkaður til portiónir. Tað, sum verður skorið burtur av upsaflakinum – og ikki fer til portiónir, fer í blokk.

- Vit hava eitt einfalt virki, sum nú er í góðum standi. Her er ikki nógv útgerð. Tvær skerimaskinur eru til upsa – ein til stóran fisk og ein til smáan, og vit hava eisini tvær skerimaskinur til gulllaks, sigur stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen.